

# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 13
September 2012

ISSN 1603-0036

Vinnaraferðin 2012 - fimm dagar í paradísi
Nýggj postgjøld 01.10.2012
Jólini 2012

Posta
FAROE ISLANDS




Myndir: Wang Jiayi

*Hvørt ár hava vit eina atkvøðugreiðslu um ársins vakrasta frímerki. Tá atkvøðugreiðslan er endað kasta vit lut millum tey sum hava luttikið í atkvøðugreiðsluni. Høvuðsvinningurin er ein ferð til Føroya. í ár var Wang Jiayi úr Kina  tann hepni vinnarin. Niðanfyri greiðir hann sjálvur frá ferðini í Føroyum.*

**Fimm dagar í paradísi**

Meðan eg ferðaðist í Norðurindia í apríl mánað, gjørdist eg sjúkur við fepri og búkilsku. Eg var illa fyri, men fór inn á eina lítla kaffistovu, har eg kundi lesa mín teldupost. Har las eg tey góðu tíðindi í einum telduposti frá Posta, at eg var tann hepni vinnarin av eini ferð til Føroya. Brádliga hvar mítt tunglyndi, tí hetta kendist heilt ótrúligt.

Eg havi droymt um at vitja Føroyar, síðani eg sá føroysk frímerki fyri fyrstu ferð í einum frímerkjablaði, og dreymurin gekk so út góð níggju ár seinni. Meðan eg var í Føroyum, so vitjaði eg skrivstovuna hjá Frímerkjadeildini og heilsaði upp á tey vinaligu starvsfólkini har. Eisini fekk eg høvi at heilsa upp á limir í føroyska filatelistfelagnum og hetta var sera hugnaligt.

Eisini fór eg til Vágarnar og tað var sera vakurt at síggja fossin í Gásadali, eg sigldi undir Vestmannabjørgunum og koyrdi ein langan túr gjøgnum sera nógvar tunlar til Norðoyggjar. Somuleiðis slapp eg eisini at uppliva føroyska mentan. T.d. slapp eg á fjall at reka seyð og vitjaði eisini heima hjá eini føroyskari familju og át døgurða saman

# Fimm dagar í paradísi - vinnaraferðin 2012





Tórshavn



Tórshavn - *Tinganes*



Vinnarin av ferðini: *Wang Jiayi*



*Her verður vitjað á Frímerkjadeildini saman við Charles Caocheng, einum av okkara samstarvsfelagum í Kina*

við teimum. Tað var eisini sera hugnaligt at ganga á Havnargøtum.

Eg kann heilt erligt siga, at áðrenn tú hevur verið í Føroyum, so kanst tú als ikki ímynda tær hvussu har sær út.

Túsund takk Posta Stamps fyri ein frálíkan túr. Eg var fimm dagar í paradísi og ætli mær heilt avgjørt at koma aftur til Føroya at vitja.

*Wang Jiayi*

# Nýggj postgjøld 01.10.2012

## Brævastøddir

| Smábrøv | Miðalbrøv | Stórbrøv |
|---|---|---|
| 23 x 17 x 0,5 cm í mesta lagi | 33 x 23 x 2 cm í mesta lagi | Longd + breidd + tjúkd í mesta lagi 90 cm |
| 23 x 17 cm | 33 x 23 cm |  |
| 0,5 cm tjúkt | 2 cm tjúkt | l+b+t 90 cm |

## Innanoyggja brøv *

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 6,50 | 8,50 | 10,50 |
| 51 - 100 g | | 11 kr | 15 kr |
| 101 - 250 g | | 17 kr | 21 kr |
| 251 - 500 g | | 28 kr | 32 kr |
| 501 - 1000 g | | 38 kr | 42 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 53 kr |

## Evropa og Norðurlond

*A-brøv*

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 12,50 | 14 kr | 17 kr |
| 51 - 100 g | 16,00 | 17 kr | 22 kr |
| 101 - 250 g | | 31 kr | 38 kr |
| 251 - 500 g | | 55 kr | 61 kr |
| 501 - 1000 g | | 90 kr | 97 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 146 kr |

## Onnur útlond

*A-brøv*

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 14 kr | 18 kr | 23 kr |
| 51 - 100 g | 17 kr | 28 kr | 34 kr |
| 101 - 250 g | | 52 kr | 57 kr |
| 251 - 500 g | | 103 kr | 110 kr |
| 501 - 1000 g | | 172 kr | 183 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 283 kr |

## Evropa, Norðurlond og A-brøv til Íslands

*B-brøv*

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 8,50 | 10,50 | 13 kr |
| 51 - 100 g | | 13 kr | 17 kr |
| 101 - 250 g | | 26 kr | 34 kr |
| 251 - 500 g | | 45 kr | 53 kr |
| 501 - 1000 g | | 74 kr | 80 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 105 kr |

## Onnur útlond

*B-brøv*

| Vekt | Smá brøv | Miðal brøv | Stór brøv |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 10,50 | 15 kr | 19 kr |
| 51 - 100 g | | 24 kr | 30 kr |
| 101 - 250 g | | 45 kr | 51 kr |
| 251 - 500 g | | 76 kr | 82 kr |
| 501 - 1000 g | | 116 kr | 133 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 210 kr |

* Postgjaldið fyri smábrøv verður hækkað upp til 7,00 kr. 1. jan. 2013




FO734

# Føroyar gjørdist nummar tvey

## - Føroyar eiga næst vakrasta Europa frímerkið!

Føroyska Europa-frímerkið av Trøllanesi, gjørdist nummar tvey í stórari frímerkjakapping.

Ein 7-mannanevnd mannað við bæði frímerkjasavnarum og listafólki, skuldi kjósa tað vakrasta av teim 55 Europa-frímerkjunum, sum eru givin út í ár.

Nummar eitt gjørdist tað russiska frímerkið og føroyska Trøllanes-frímerkið gjørdist nummar tvey. Áland/Finland gjørdust nummar trý.

Eyðbjørn Jacobsen hevur tikið myndina, sum er á føroyska frímerkinum.




*Russiska frímerki, ið gjørdist nummar eitt*

Frá vinstru: jólaprýði, jólakort, jólamerkini, ársmappa og árbók 2012




# Jólini 2012

## Jólamerki

Janus Guttesen hevur teknað ársins jólamerki, sum avmynda ymisk myndevni í Føroyum.

Avlopið av jólamerkjasøluni fer sum vanligt til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.  Jólamerkjaarkið kostar 30,00 kr

## Ársmappa

Ársmappan verður givin út í november. Hon er 235 x 202 mm til støddar, og í henni eru øll frímerkini og smáørkini, ið eru givin út í ár. Hefti og postgjaldsmerki eru ikki við í ársmappuni, sum verður seld fyri áljóðandi virði.

Ársmappan kostar 302,50 kr

## Árbók

Í ár hevur árbókin fingið nýtt snið. Tekstirnir eru nú á trimum málum , donskum, týskum og enskum, men í somu bók. Enn sum áður so lýsir árbókin við greinum og vøkrum myndum allar ársins frímerkjaútgávur. Øll frímerki og smáørk eru sett í lummar í árbókini, sum nú er  240 x 220 mm til støddar.

Postgjaldsmerkini eru ikki við í bókini.

Árbókin kostar 365,00 kr.









## Jólaprýði

Posta hevur í fleiri ár givið út jólaprýði.
Í ár er tað Janus Guttesen, sum hevur staðið fyri sniðgevingini av ársins jólaprýði.

Tey trý myndevnini eru tær tríggjar kirkjurnar, sum eisini eru at síggja á jólamerkjaarkinum: Christianskirkjan, Tvøroyrar kirkja og Havnar kirkja.

Jólaprýðið er úr messingi og lagt við gulli. Gyltur snórur er festur í prýðið, so klárt er at heingja upp. Tey eru uml. 8,5 cm til støddar, og verða seld í vakrari eskju - trý í hvørjari.

Jólaprýðið kostar 95,00 kr. settið, íroknað mvg.

## Jólakort

Í sambandi við jólaútgávuna gevur Posta eisini út trý jólakort við somu myndevnum sum jólaprýðið.

Jólakortini eru dupult og verða tey seld sum sett saman við bjálvum.

Jólakortini kosta 25,00 kr settið.

# Útgávur - 5. november 2012




Nýggj útgáva: **Árbók 2012**
Útgávudagur: 05.11.2012
Prísur: **365,00 kr.**




Nýggj útgáva: **Ársmappa 2012**
Útgávudagur: 05.11.2012
Virði: **302,50 kr.**



Nýggj útgáva: **Jólamerkini 2012**
Útgávudagur: 05.11.2012
Teknað: Janus Guttesen
Virði: **30,00 kr.**

Forsíðumynd: Wang Jiayi í Føroyum
Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo